Fylgiskjal 26

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 16.01.2020
J. nr.
Viðgjørt J. Christiansen
Tykkara j. nr.17/00644
og 19/00971

**Hoyringsskriv viðvíkjandi**

1. Uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin)
2. Uppskoti til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)

**MEGD hevur hesar viðmerkingar**

**Ad 1 Uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin)**

**§1 Endamálið við hesi løgtingslóg er at menna og endurmenna.**
Umboðandi MEGD fegnast vit um, at menning og endurmenning er komið inn í lógina, og er hetta í tráð við ST sáttmálan grein 26, sum áleggur limalondunum at skipa, styrkja og víðka víðfevndar menningar- og endurmenningartænastur, soleiðis at fólk, ið bera brek, verða før fyri at vinna sær og varðveita størst møguligt sjálvræði og luttøku í øllum lívsins viðurskiftum[1]. Endurmenning – rehabiliteringatankin - eigur at vera grundarlagið undir øllum avgerðum og atgerðum um vælferð.

**§ 3, stk 4 Almannaverkið hevur ábyrgd av samskipan og samstarvi.**
Umboðandi MEGD fegnast vit um, at stk. 4, sum ásetur ábyrgd fyri endur- og menningarætlanini, er komið afturat. Og at Almannaverkið skal samskipa og samstarva við aðrar myndugleikar, tá tørvur er á fyriskipan undir øðrum myndugleika. Og tá talan er um rehabilitering snýr tað seg um fleirpartasamstarv vísandi til útsøgn í MEGD blaðnum frá 3. Des. 2019: *Arbeiðsgongdin í rehabilitering er skipað sum tvørfakligt toymisarbeiði, ið røkkur tvørtur um fakmørk og geirar, og tað er eitt javnbjóðis samstarv millum borgara, hansara avvarðandi og fakfólk, um endamál og tey mál, sum borgarin vil røkka.*

**§ 7 Uppihaldsveiting**
MEGD tekur undir við, at útlendingar, sum hava rætt til ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi, eisini hava rætt til at fáa longur varandi uppihaldsveiting.

---

[1] MEGD heimasíða: file:///C:/Users/jonvor/Downloads/ST%20s%C3%A1ttm%C3%A1lin%20um%20r%C3%A6ttindi%20hj%C3%A1%20einstaklingum.%20i%C3%B0%20bera%20brek%20(14).pdf

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

**§§ 11, 14 og 21**
MEGD tekur undir við, at veiting kann veitast óheft av inntøku hjá hjúnafelaga.

**§ 12 Uppihaldsveiting og fongsul**
MEGD tekur undir við broytingini, um skipanin leggur upp til, at fólk kunnu arbeiða og forvinna eina inntøku.

**§§ 20, 25 og 28**
MEGD tekur undir við, at upphæddirnar verða prísreguleraðar, at markið fyri innistandandi (§20) og endurgjald fyri inntøkumiss er hækkað (§25). MEGD tekur undir við, at Almannaverkið kann gera avtalur við privatar útleigarar (§28).

**§ 31.**
MEGD vil tilmæla at endurmenning sum hugtak verður nevnt her.

**§ 42 Tulkatænasta**
Tilskilað eigur at verða, at talan er um bæði teknmáls- og skrivitulk.

**<u>AD 2 Uppskoti til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)</u>**

**§ 1 Virkisøkið**
Viðvíkjandi stk 1. MEGD vil mæla til, at umframt orðingina *persónur við týðandi sálarligum virkistarni,* kemur at *standa týðandi og **varandi** sálarligum virkistarni*. Somuleiðis, at tað framgongur, at ein individuel og faklig meting skal gerast av virkistarninum og tess fylgjum. Ein áður sett sjúkuavgerð (diagnosa) merkir ikki, at ein uttan víðari kann nýta tvingsil. Ein liður í metingini kann tó vera ein læknalig sjúkuavgerð. Virkistarnið skal vera bæði týðandi og varandi. Tað merkir, at reglurnar um tvingsil ikki galda, tá ein persónur hevur eina ørvitisstøðu (t.d delir av bløðrubruna), sum gongur yvir, og reglurnar skulu ikki galda fyri fólk við demens í lættari mun.

**§§ 8, 11 og 12**
MEGD tekur undir við, at ásetingarnar **verða strikaðar**, og at leiðslan ikki kann taka avgerð um at nýta ávaringar- og peilingarskipanir (§ 8), at halda persóni føstum ísv reinføri og grundleggjandi tørv (§ 11) og um nýtslu av hjálparráði at verja móti skaða (§ 12) í teimum førum, tá talan er um sjúku, ið er í menning og gongur afturá, men at hesi mál skulu leggjast fyri Tvingsilsnevndina.

**§§ 24 og 29**
MEGD tekur undir við, at tey avvarðandi kunnu kæra (§24). Somuleiðis tekur MEGD

undir við, at inntriv ikki kunnu vera í óavmarkaða tíð (§29), og at myndugleikin og leiðslan støðugt skulu meta um tørvin á inntrivinum og tillaga ella steðga inntrivinum, um tað ikki er neyðugt longur 8§29, stk 4). Soleiðis verður tryggjað minsta inntriv so avmarkað og stutt sum gjørligt vísandi til grein 14 í St-sáttmálanum, at fólk við breki:

> *...fáa nýtt sín rætt til persónligt frælsi og persónliga trygd* (14, stk 1,a).

> *.... at fólk, ið bera brek, verða frælsisskerd av einihvørjari orsøk, skulu tey á jøvnum føti við onnur hava rætt til trygd í samsvari við altjóða mannarættindi og skulu verða viðfarin í samsvari við endamál og meginreglur í hesum sáttmála (14, stk 2).*

**Virkisætlan og týdningurin á vegleiðing av starvsfólki**

MEGD fegnast um, at tilmælið um virkisætlan verður skipað í vælferðarlógini.

Virkisætlanin skal innihalda: a) Ætlaða átakið og mál fyri átakinum, b) hvørjar atgerðir og háttaløg væntast, at starvsfólkini nýta og c) hvussu og nær átakið skal eftirmetast.

Í samband við tvingsil mælir Videnenscenter for demens til, umframt at gera eina virkisætlan, eisini at gera ein røktarætlan fyri fólk á sambýlum og eldrabústovnum, so øll starvsfólk vita, hvørja røkt og sosialpedagogisk tiltøk skulu fremjast. Leinki: http://www.videnscenterfordemens.dk/pleje-og-behandling/lovgivning-og-demens/magtanvendelse/handleplan/ (vitjað 13.01.2020)

Tað kunnu vera nógv ivamál bæði hjá leiðarum og starvsfólki um nýtslu av tvingsli. MEGD vil vísa á, at tann undirvísandi pedagogiski parturin er sera týdningarmikil, tá lógin fær virknað. Tí eigur myndugleikin at seta ressursir av til tann partin ta fyrstu tíðina, tá lógin er komin í gildi. Royndirnar úr DK at seta lokalar ambassadørar á arbeiðsplássunum, sum undirvístu í lógini um Lov om magtanvendelse og fráboðan viðførdi, at starvsfólkini blivu førleikamennt í sosialpedagogiskum tiltøkum og nýtsla av valdi minkaði. Socialstyrelsen hevur útgivið undirvísingartilfar í 4 modulum, sum leiðarar, starvsfólk og lesandi kunnu nýta til at ogna sær vitan um reglurnar og umhugsni viðvíkjandi praksis til at fyribyrgja, handfara og læra av støðum um tvingsil. Tilfarið kann takast niður her: https://socialstyrelsen.dk/tvaergaende-omrader/magtanvendelse/om-magtanvendelse/fra-1-jan-2020-brug-af-magt-voksne-med-psykisk-funktionsnedsaettelse/regler-om-brug-af-magt (Vitjað 13.01.2020)

Gott at hava hesa fyrimynd úr DK, har Sundheds- og Socialstyrelsen skipa fyri kunningardøgum fyri fakfólk og tilsýnsførandi á eldra- og almannaøkinum um nýtslu av nýggju reglunum, sum komu í gildi 1. jan. 2020:

- Temadage for fagprofessionelle på både ældreområdet og socialområdet: 10 dage fra oktober 2019 til marts 2020.
- Formidlingsdage for tilsynsførende på socialområdet: 3 dage i oktober 2019
- Formidlingsdage for tilsynsførende på ældreområdet: 2 dage i oktober og nov. 2019 (https://www.sst.dk/da/viden/demens/anbefalinger-og-haandboeger/magtanvendelse)

Vinaliga fyri MEGD

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Keldur:

1. **MEGD** blað, 2019. Sonne Smith.
2. **Socialstyrelsen**. Til fagpersoner. Regler om brug af magt over for voksne med betydelig og varigt nedsat psykisk funktionsevne (2019. 2. útgáva): file:///C:/Users/jonvor/Downloads/Magtanvendelse_Fagpersoner_Socialstyrelsen_web2%20(1).pdf (Vitjað 15.01.2020)
3. **Socialstyrelsen**. Til myndighedspersoner. Regler om brug af magt over for voksne med betydelig og varigt nedsat psykisk funktionsevne (2019, 2. útgáva): file:///C:/Users/jonvor/Downloads/Magtanvendelse_Myndighedspersoner_Socialstyrelsen_web2.pdf (Vitjað 15.01.2020)
4. **Socialstyrelsen.** Til borgere og pårørende. Regler om brug af magt over for voksne med betydelig og varigt nedsat psykisk funktionsevne (2019, 2. útgáva): file:///C:/Users/jonvor/Downloads/Magtanvendelse_Borgere%20og%20p%C3%A5r%C3%B8rende_Socialstyrelsen_web2%20(2).pdf. (Vitjað 15.01.2020)
5. **Sundhedsstyrelsen**: https://www.sst.dk/da/viden/demens/anbefalinger-og-haandboeger/magtanvendelse (vitjað 15.01.2020)
6. **Retsinformation:** Vejledning om magtanvendelse og andre indgreb i selvbestemmelsesretten over for voksne, herunder pædagogiske principper. https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=198377 (Vitjað 15.01.2020)

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo